# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Elfelagið SEV:

## 35 og 40 ára starvsdagar



*13. november 2004 hevði Margaret Christiansen starvast sum skrivstovukvinna hjá Elfelagnum SEV í Vestmanna í 40 ár*

*10. mars 2005 hevði Bina Miðberg starvast sum skrivstovukvinna hjá Elfelagnum SEV í Vestmanna og í Havn í 35 ár*



### Dagurin

**11. mars. Thala**. Ókend ung genta, sum tíðliga í fornkirkjuni varð tikin av døgum fyri trúgv sína.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg á 80 ára føðingardegnum 15. september 2004.

Takk fyri heilsanir, gávur og uppringingar. Takk til øll, ið komu í føðingardag og gjørdu mær dagin so hugnaligan.

Ein serlig tøkk til børnini, ið hjálptu so væl til við at halda dagin.

**Bestu heilsanir**
**Sigga Jóhanna Rasmussen, Haraldsund**

Sp/f A.H. Jensen:

## Tryggja tær at vøran er umhvørvisvinarlig

**Åge H. Jensen, ið eigur og rekur fyritøkuna "A. H. Jensen" í Stoffalág í Havn, sum selur alt innan reingerð, sigur, at í dag eru nógvir leverandørar á marknaðinum, men ikki allir gera eins nógv við etikk, kvalitet, umhvørvi, heilsu og tænastu**




**REINGERÐ**

Nógvir leverandørar bjóða seg fram við reingeringsevnum, men ikki allir gera eins nógv við etikk, kvalitet, umhvørvi, heilsu og tænastu, sigur Åge H. Jensen, ið eigur og rekur fyritøkuna "A. H. Jensen" í Stoffalág í Havn. Hann sigur, at vørurnar teir selja eru góðkendar av bransjusamtakinum SPT-Charter, sum bindur teirra leverandørar til at halda tey strongu krøvini um etikk, kvalitet, umhvørvi og tænastu á hægsta støði.

Krøvini frá samfelagnum til vinnulívið vaksa alla tíðina, serliga hvat reinføri og umhvørvinum viðvíkur. Leverandørar av reingerðingsproduktum hava stóran týdning í dagsins samfelag, teir eru við til at syrgja fyri at reinførið er í ordan, hvar tað so skal vera, á sjúkrahúsinum, í matfram-leiðsluni, í køkinum ella á skrivstovuni.

Tað eru ikki einans mannagongdirnar í framleiðsluni talan er um, men eisini sjálv vøran ið freimleidd verður, skal vera í samsvar við SPT-Charter, ið við jøvnum millumbili kanna um vørurnar lúka treytirnar.

Krøvini frá SPT-Charter eru t.d. at ikki er loyvt at gera kanningar við djórum uttan lógarheimild, ikki er loyvt at hava børn í arbeiði, at vørurnar gera minst møguligan skaða á heilsu og umhvørvið, og at starvsfólkini í framleiðsluni hava eitt heilsugott og trygt arbeiðsumhvørvi.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá elskaða kona mín, mamma, vermamma,
omma og langomma okkara

**Kirsten N. F. Rasmussen**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

Tøkk til prestar, sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt
veittu okkum hjálp.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, vitjanir
og gávur til KFUK í Havn.
Tøkk til starvsfólk á Landssjúkrahúsinum,
sum vóru so væl um hana.
Tøkk til tykkum øll, sum vóru í kapellinum,
og sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Nicodemus**
**Oddmar, Suni, Ólavur, Jonna Kathrina og Ninny**

## Tøkk

Á hendan hátt vil eg mær venda, eina stóra tøkk til tykkum øll senda, sum á ein so ógloymandi hátt gjørdu mær 70 ára dagin so minnisríkan. Frá árla á morgni bleiv tikin á bóli av orkesturtónum og sangi. Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit, brøv og telefonsamrøður bæði innan- og uttanlands. Tøkk tit sum stukku inn á gólvið og øll tit sum í Skálan komu. Tøkk øll tit sum við tykkara stóra hjartalag gjørdu so ómetaliga nógv fyri meg. Orð eru fátøk. Tøkk fyri øll tey góðu orð, ið fram vóru borin. Og uttan tykkum allar mínar leikbrøður veit eg ikki hvussu hevði verið vorið. Og Greivan av Palastria, takk fyri heiðursmerki vakurt. Takk fyri tit sum av flatlondum komu. So ein tøkk til øll míni



kæru, mann, børn, svigarbørn, ommu- og langommubørn. Takk fyri tit stuðlaðu so væl. Enn einaferð stóra tøkk øll somul. Harrin signi tykkar fjálga hjartalag.

**Heilsan Adelborg**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara kæri sonur, bróðir og svágur

**Ingi Naresh Petersen**
**Norðragøta**

andaðist sunnudagin 6. mars, 18 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju
fríggjadagin 11. mars kl. 14.00.

**Dagny, Dagfinnur, Terji, Anita og Eyðvør**

Tey, ið vilja minnast Inga við blómum ella kransi, kunnu ístaðin
lata Gøtu kirkju eina gávu, konto í peningastovnunum.